# – Vit hava verið klárir alla tíðina

**Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu, sigur, at kommunan hevur verið til reiðar við sínum íkasti alla tíðina. – Vit fegnast um, at gongd er í málinum, og vit vildu helst sæð, at gongd kemur á byggingina av handilsmiðstøðini heilt skjótt, sigur hann**

HANDILSMIÐDEPIL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ikki Klaksvíkar kommuna, sum hevur ligið í buktini fyri ætlaðu handilsmiðstøðini í Klaksvík.

Tað sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri.

- Vit hava verið klárir við okkara parti alla tíðina. Økið er lagt út til miðdepilin, og vit fara at gera tann partin, sum verður okkara.

### Stórt øki

Borgarstjórin sigur, at økið, sum er lagt út og liggur innast á vágni í Klaksvík, er einar 20.000 fermetrar stórt, og tað er ríkiligt til teir umleið 6.000 fermetrarnar, sum ætlanin í fyrsta lagi hevur verið at byggja á økinum.

- Kommunurnar partur er í fyrsta lagi byggilendið og tær kloakkir og íbindingar, sum skulu til. Haraftrat kemur ætlaða torgið og uttanum økið, sum hann tekur til. Vit ætla eisini at gera eina atløgu á ytra enda á økinum, har bátar kunnu liggja, eitt nú stuttleikabátar og onnur smærri før. Endamálið við hesum er at gera umhvørvið við handilsmiðstøðina spennandi og dragandi.

### Mentanarhøll

Borgarstjórin sigur, at aðrar ætlanir, sum eru á økinum, er ein stór mentanarhøll, sum feløg helst fara at byggja. Júst, hvussu hetta verður skipað, er ikki greitt enn. Ein slík høll er ætlað til mentanarlig tiltøk av ymiskum slagi, eitt nú konsertir, framsýningar av ymiskum slagi og annað.

- Okkara vón er, at byggingin av handilsmiðdeplinum kemur í gongd sum skjótast, og vit gleðast um, at áhugin fyri miðstøðini er stórur, bæði millum stigtakarar, fólk, sum hugsa um handilsvirksemi, men eisini millum tey, sum vilja fíggja verkætlanina, sigur borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Steinbjørn Jacobsen.



*- Okkara vón er, at byggingin av handilsmiðdeplinum kemur í gongd sum skjótast, og vit gleðast um, at áhugin fyri miðstøðini er stórur, sigur borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Steinbjørn Jacobsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Yvirlivdi flóðaldu - druknaði á útróðri

**Norski útróðrarmaðurin, Finn Bertram Evensen, er helst sjólátin eftir, at 33 fót stóri útróðrarbátur hansara Skarbak varð ásigldur av 140 metra langa norska kemikaliuskipinum Doris**

SORGARLEIKUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Eg fann ikki friðin, fyrr enn eg var umborð á báti mínum aftur, sigur norskur útróðrarmaður, sum eftir øllum at døma er druknaður eftir ásigling*

Dúgliga hevur verið leitað eftir manninum, men hóast báturin er funnin – og eisini ein yvirlivilsisdrakt, bendir alt á, at Finn Bertram Evensen er druknaður.

Finn, sum var 54 ára gamal og búði í Straumsjøen í Vesterålen, var annars ein av teimum, sum yvirlivdi stóru flóðalduna á frítíðarplássinum Patong í Thailandi í 2004.

Miðskeiðis í februar og bert tveir mánaðir eftir herviligu flóðalduna, sum tók lívið av fleiri enn 284.000 fólkum, var útróðrarmaðurin longu fyrstu ferð í báti sínum aftur.

Í samrøðu, sum dagbladet no. hevði við Finn umborð á Skarbak, haðani henda myndin er, segði hann, at tað var umborð á báti sínum, at hann hevði funnið besta friðin eftir ræðuleikarnar, hann upplivdi í Thailandi.

- Eg fann ikki friðin, fyrr enn eg var umborð aftur á báti mínum, segði hann.

Undir veldugu flóðalduni royndi norðmaðurin at bjarga fólki, ið vóru á leiðini, har hann var staddur. Meðan hann stríddi seg niðaneftir strondini í øgiligu rúgvuni av sjógvi, kom hann fram við einari enskt talandi kvinnu, sum var púrasta útmødd. Hann bar ein lítlan son, men megnaði ikki at halda honum úr vatnskorpuni. Tað eydnaðist Finni at bjarga teimum báðum aftur um ein betongmúr. Meðan tey stóðu aftanfyri múrin, kom hjúnarfelagi hennara rekandi fram við.

- Hann megnaði at koma higar, har vit vóru stødd. Tey avgjørdu at royna at sleppa tvørtur um nógva streymin av sjógvi. Eg segði, at tey vóru noydd at fylgja mær, tí eg var kendur í økinum. Men tað gjørdu tey ikki. Eg sá, at tey vórðu knúst í øllum meldrinum. At eg ikki var meira avgjørdur um, at tey skuldu fylgja mær, hevur virkuliga plágað meg, segði útróðrarmaðurin við dagbladet.no.

Nú bendir alt á, at Finn Bertram Evensen sjálvur er sjólátin.

Báturin er sleipaður til lands og er tikin upp, eins ymiskt annað, sum lá og rakst á leiðini, har hann varð ásigldur.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Estrid Joensen av Eiði** andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin, 79 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Eiðis kirkju fríggjadagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Estrid kunnu lata eina peningagávu til Korndalsbýlið. Konta í peningastovni.



## Tøkk



Hjartaliga takki eg øllum teimum, sum heiðraðu meg á 85 ára føðingardegi mínum.

**Vinaliga**
**Mona Midjord**

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á 70 ára føðingardegnum 13. juli.
Tit gjørdu okkum dagin ógloymandi.

**Kærastu heilsanir**
**Hildigunn og Mortan**


**Dagurin**

**12. oktober. Maximilianus**, deyður umleið ár 285. Pávin Sixtus II sendi hann sum trúboðara til tað, sum nú verður rópt Eysturríki.